# Klaksvík avdúkað heimsins størsta frímerki

**Fyrrapartin í gjár varð heimsins stórsta frímerki avdúkað á suðurendanum á posthúsinum í Klaksvík**

KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*




*Spenningurin var stórur, tá borgastjórin í Klaksvík avdúkaði heimsins størsta frímerki*



*Góðar tvær ferðir tríggjar metrar mátar heimsins størsta frímerki, ið verður at síggja á suðurendanum á posthúsinum í Klaksvík alla hesa vikuna*



*Nýggja frímerkið er úrslit av samstarvi millum Klaksvíkar Kommunu, Frímerkjadeildina og listamannin Edward Fuglø*

Fitt av fólki var samankomið, tá heimsins stórsta frímerki, sum mátar góðar tvær ferðir tríggjar metrar, varð avdúkað á suðurendannum á posthúsinum í Klaksvík í gjár.

Tað er Eward Fuglø, listamaður, ið hevur gjørt frímerkið í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu í ár.

Frímerkið skal síggjast sum ein skaldsligur fagnaður av Klaksvík, sigur listamaðurin.

## Klaksvík á heimskortið

Sermerkta frímerkið er úrslit av samstarvi millum Frímerkjadeildina, mentanardeildina hjá Klaksvíkar kommunu og listamannin Edward Fuglø.

Eftir at hava bjóðað vælkomin, gav Svanbjørg Manai, leiðari á Frímerkjadeildini, Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóra, orðið og heiðurin av avdúka ovurstóra frímerkið.

Borgarstjórin fjaldi ikki yvir, at hetta kendist sum ein stór hátíðarløta.

- Henda útgáva er við til at seta Klaksvík á heimskortið saman við einum av okkara fremstu listafólkum, Edward Fuglø, sum við hesum frímerkinum sera beinrakið lítur langt út í framtíðina, segði Steinbjørn Jacobsen millum annað.

Eftir at frímerkið var avdúkað, vórðu øll boðin inn á posthúsið til ein bita og okkurt drekkandi afturvið. Hesa løtuna handaði Svanbjørg Manai borgarstjóranum og listamanninum hvør sítt innrammaða eintak av frímerkinum.

Síðani var Edward Fuglø klárur at signera fyrstadags brævbjálvar, sum øll, ið høvdu hug, fingu høvi at ogna sær.

## Skaldsligur fagnaður av Klaksvík

Hetta er ikki fyrstu ferð, Edward Fuglø teknar frímerki, og veit hann, hvat ein slík uppgáva inniber

- Myndevnið má fyrst og fremst kunna fungera í lítla frímerkjaformatinum. Tí má tað vera lutfallsliga einfalt og markant, sigur Edward Fuglø, sum hesuferð hevur tikið støði í pyramiduskapaða Kunoyarfjalli.

- Grundleggjandi myndevnið gav seg mest sum sjálvt, tí umhvarvið av Kunoyarfjalli er jú vorðið sjálv ímyndin av Klaksvík, sigur listamaðurin.

Frá pyramiduskapinum er frímerkið bygt upp sum ein lýrisk brotamynd, har fiskurin ímyndar vinnuna, báturin endurspeglar samferðsluna, grønu teigarnir leita aftur til dyrkaða lendið og bóndasamfelagið, meðan húsini upp eftir fjallasíðuni siga søguna um heim og trivnað.

Eisini tað søkjandi, droymandi og framtíðin eiga sítt pláss í merkinum í barninum, sum hyggur at mánanum og stjørnunum. Tær seks stjørnurnar ímynda tær seks norðoyggjarnar.

Á nýggja merkinum hevur havið eisini fingið ein nýggjan listarligan búnað í aldutu skriftini í navninum "Klaksvík".

Sambært Edwardi Fuglø er frímerkið ætlað sum ein skaldsligur fagnaður av Klaksvík í 100 ár.



*Eftir avdúkingina vóru leskiligir pinnamatar at fáa inni á posthúsinum*




Netbanki - tá tí og hugur er til tess

Við netbanka-loysnini hjá Skjern Bank kanst tú keypa og selja virðisbrøv tá tú hevur tíð og hug.

Set teg í samband við Gunnar Streymoy og fá meira at vita.



Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK